

Fýra skip hjá Olympic Ship hava einki at gera. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Fleiri frálandaskip leggjast fyri teym

**Jógvan Hugo Gardar**

02.12.2015 - 14:05

Oljan.fo

Talið á fralandaskipum sum eru arbeiðsleys veksur. Fyri fáum vikum síðani kundi norska reiðarafelagið boða frá at talið á frálandaskipum og boripallum sum antin eru uttan arbeiði, ella sum fara at verða arbeiðsleys í vetur, var 120.

Nú er talið økt, og liggur um 130 skip.

Fríggjadagin legði norska reiðaríið Olympic Ship fram síni roknskapartøl fyri triðja ársfjórðing. Leiðslan var nøgd viv úrslitið, sum er tanntriðbesti ársfjórðingurin hjá felagnum nakrantíð. Felagið hevur tað í dag gott fíggjarligt, og hevur eina eginogn uppá 3,1 milliardir norskar krónur. Skuldin í fyritøkuni liggur um 6,4 milliardir krónur. Harav skal ein milliard gjaldast í 2016.

Men útlitini eru ikki líka hugalig. Olympic Ship hevur lagt tvey skip, og fýra onnur skip verva løgd um stutta tíð.

Eitt annað norskt reiðarí, Island Offshore, boðar fr\a at tey leggja Island Commander. Skipið hevur verið á spotmarknaðinum í tríggjar mánaðir uttan at fáa eina einastu eina uppgávu. Við hesum eru sjey av skipunum hjá Island Offshore løgd. Fyritøkan rekur til samans 29

skip. Av teimum sjey skipunum sum liggja hjá Island Offshore eru trý sum bara skulu liggja í vetur. Tey fáa nýggjar uppgávur í apríl. Fram til tá er manningin koyrd heim uttan løn.

Umframt norsku reiðaríini sum hava bova frá at tey leggja skip fyri teym, so hava millum annað Mærsk Supply Service, Sealion Shipping og ER Offshore fleiri skipliggjandi fyri teym.